


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 07 - 2013

# Arbeiðaraflokkur ímóti at Statoil flytur størv

Norski Arbeiðaraflokkurin, sum situr við róðrið í stjórnini, er alt annað enn fegin um ætlaninar hjá oljufelagnum Statoil at flyta 1000 størv úr Norra til lágkostnaðarlond. Hetta er brot á politikkin hjá stjórnini um ognarrætt sigur flokkurin. Um Statoil veruliga ætlar at fremja sínar ætlanir um at flyta størv úr Norra til onnur lond, er eingin ivi um, at hetta stríðir ímóti politikkinum hjá reyð-grønu stjórnini um ognarrætt, og hetta er als ikki í tráð við tann leiklut, sum Arbeiðaraflokkurin heldur Statoil skal hava, sigur vinnutalsmaðurin hjá flokkinum, Terje Aasland við Klassekampen, sambært heimasíðuni Hegnar Online. Hann vísir á, at stjórnin hevur gjørt púra greitt, at høvuðsskrivstovan hjá Statoil skal vera í Norra og at týðandi funktiónir í størst møguligan mun skulu vera har. Statoil ætlar at flyta 250-300 størv úr Norra til lágkostnaðarlond longu innan 2015 og 1000 størv innan 2020. Tað eru størv innan KT, byggiumsiting, HR og fígging. Statoil-leiðslan hevur ikki blankofulltrú at gera sum henni lystir, soleingi har er yvirskot. Bara at hugsa um profit, vinning er ikki í tráð við okkara ynski sum eigari, sigur Cecilie Bjelland frá Arbeiðaraflokkinum í Stavanger. Ætlanin er at taka hetta málið upp á hægsta stað í Arbeiðaraflokkinum í august. Statoil hevur ikki ikki gjørt av, um tað fer at gera álvara av ætlanunum, tí mugu vit nú senda eitt greitt signal. Felagið skal ikki bara hava vinning sum mál men hevur ein leiklut sum samfelagsaktørur, sigur hon við NTB.